# sálarørsku

ella samkomuleiðaranum. Brøðurnir hava elstaráðið, og kirkjan hevur sína stjórn og bisp. Endamálið við hesum er eitt nú at verða ráðgevandi í ivaspurningum og at stinga út í kortið leiðina hjá samkomuni.

– Best er, um samkoman hevur eitt ráð, sum foreldrini kunnu venda sær til, um tey meta, at børnini uppliva okkurt, sum foreldrini ikki kunnu standa inn fyri, sigur Eyðun Joensen. Og hann vísir til hendingina, tá bispur setti Hvalvíksprest uppá pláss undan jólum.

– Vit minnast tað frá Hvalvíksprestinum, tá hann lítlajólaaftan kom við eiturblandinum um lærarar og homofili. Tá segði bispur, sera turt, í bløðunum, at hann varð bilsin av orðunum, og at tey vóru betur ósøgd. Elstaráðini, stýrini og kirkjuliga umsjónin eru eftirlitsamboð, sum tryggja, at alt ikki ber til.

### Fríi viljin

Men so vildi onkur helst sagt, at ongin noyðir tey ungu at vitja samkomuna, og at tey hava ein frían vilja. Og Eyðun er skjótur at svara:

– Kanst tú hugsa tær, hvar eg havi hoyrt júst hatta fyrr? Í gjøgnum eitt langt arbeiðslív havi eg mentalkannað nærum allar føroyskar barnalokkarar, sum hava sitið inni fyri misgerningar sínar. Hatta er ein verndarrøða, sum eg hoyri, hvørja tí einastu ferð. "Eg havi gjørt tað, men barnið ella tann ómyndugi var við uppá tað, ja, í mongum førum legði barnið upp til tað." Nú er her ikki talan um fysiska neyðtøku, men um eina massiva andaliga ávirkan. Og gudnáði tann, sum forførir eitt barn kropsliga. Fremur tú kropsligan ágang ímóti einum barni, so fellur tann juridiski hamarin umgangandi, tú fært politiið uppá nakkan og endar kanska í fongslinum. Eg síggi vissar parallellir her: Hetta at ávirka og gera seg inn á ómyndingar, sum ikki mótmæla. Tí, tú hevur sum vaksið menniskja alla somlu ábyrgdina, tá tað snýr seg um ómyndingar. Tað nyttar ikki hjá einum vaksnum at verja gerðir sínar við, at tey ungu vóru við uppá tað og gjørdu tað av fríum vilja. Tað nyttar einki, tí at tú sum vaksin hevur evstu ábyrgdina, og tú hevur skyldu til at kenna avleiðingarnar av gerðum tínum.

### Dupulta revsiramman

Eyðun vísir til lóggávuna, sum herðir ábyrgdina hjá teimum, sum hava ábyrgd av ómyndingum.

– Lærarar, pedagogar, læknar, sálarfrøðingar og onnur, sum í ávísum førum fáa litið ábyrgdina av ungfólkum upp í hendurnar, hava dupulta revsirammu í mun til vanlig fólk. Tað stendur greitt í lógini at verður ágangur framdur ímóti einum ómyndingi, sum er í tínari varðveitslu, umsjón og verju, so hevur tú eina serliga moralska, etiska og juridiska ábyrgd, í mun til onnur. Tað er litið teimum ein so stór ábyrgd upp í hendi. Bjóðar tú tær til at vera hirði fyri eini samkomu, so hevur tú kanska ikki hesa somu juridisku ábyrgd, men tú hevur sanniliga eina moralska og etiska ábyrgd.

### Kann elva til sálarørsku

Men hvørjar kunnu avleiðingarnar gerast hjá teimum ungu?

– Sum sálarfrøðingur óttist eg, tá satsað verður harðliga uppá ung fólk, sum eru viðbrekin og løtt at ávirka. Fyri tey kann ein kokkteylur við øgiligum kenslum, har stemningurin verður pískaður upp, við endurtøkum og bólkatrýsti, førka onkur ung fólk, sum hava nóg tunt skal á sálini, yvir um mark – frá at vera frísk, til at gerast sjúk. Eg veit tað og havi sæð tað í ólukkumát, greiðir Eyðun Joensen frá. Samstundis sum hann sigur, at ongin skal siga, at religión er skaðilig, tí hon er nevniliga positiv, og at hon tíbetur er um alt samfelagið.

– Men vit síggja sanniliga eisini baksíðuna av medaljuni, tá religiónin verður brúkt skeivt, og tað er so lætt hjá okkum at skjóta eftir Islam. Eg havi sæð óteljandi dømi um hetta, at serliga saftig gudilig ávirkan, á sama hátt sum annað, vit bjóða likami og heila, kann framprovokera eina sálarliga ørsku – at ein andalig øsing festir í eina latenta sálarørsku, sum annars hevði ligið undir vatnskorpuni, sigur sálarfrøðingurin.

### Um onnur slík rák

Vit hava áður upplivað samkomur, sum fóru sera langt í trúnni. Onkur hildu seg til at ganga á vatninum, og onnur gingu á landavegunum við einum stórum krossi.

– Tað hava upp gjøgnum tíðirnar verið bylgjur – eg vil ikki rópa tað veking, tí tað er eitt positivt orð – har samkomur hava verið villar. Og í summum førum eru tær farnar yvir gevind. Men tá eru samkomurnar sjálvar komnar fram til, at nú er nóg mikið, og tær hava avgjørt at repa seglini og koma inn á kós aftur. Tað er ómetaliga positivt og gott, tá samkomurnar sjálvar klára at koma upp á rætt kjøl aftur. Tað var eisini tann tíð, tá fólk ræddust Solo í Klaksvík, men nú er hon ein vanlig samkoma, sum er fallin væl til í Klaksvík.

### Ør av religión

Tað kemur meiri enn so fyri, at fólk verða innløgd á afturlatnari deild, tí tey eru vorðin religiónsforstýrað. Fyri at vísa á, hvussu stórur munur er á etableraðu skipanini og summum samkomum, greiðir Eyðun frá, um einaferð eitt slíkt upplop var einastaðni í Føroyum.

– Tey leikaðu í sum ør og reikaðu uppi alla náttina. Tá kom ein ungur persónur inn á deildina og var heilt ótrúliga illa fyri. Hevði ikki sovið í eina viku og var heilt ómetaliga niðurundirkomin – púra ørur og psykotiskur, minnist Eyðun, og greiðir frá, at í slíkum førum er mannagongdin, at persónurin verður innlagdur á afturlatnari deild, har friður og starvsfólk eru at taka sær av honum. Og so at geva honum einakamar, frið og heilivág.

– Tá upplivdu vit, at samkoman kom kropp á kroppi til Havnar á vitjan í fyrstu vitjunartíðini. Har vísti Árni Olsen, mín góði starvsfelagi og fyrimynd, sum absolutt ikki var nakar heiðin maður, sítt fakliga mandat og tign, og blakaði heila buntið út. Og eg loyvi mær at spyrja: Mundi tað vera av næstakærleika, at hesi fólkini komu á vitjan. Ella komu tey fyri at gera verkið liðugt? spyr Eyðun.

Og hann fer beint víðari og trívir í hugtakið: vøka.

– Lat okkum ímynda okkum, at moyru ungfólkini, sum krevja nógvan svøvn, leggja fyri klokkan 6 á morgni við eini seancu ella morgunbøn, áðrenn tey fara til arbeiðis ella í skúla. Síðani halda tey fram seinnapartin, viðhvørt til langt út á náttina. Tey verða svøvnrúsað, gerast høg. Og vit kunnu ímynda okkum, at tað hendir seint á kvøldi, undir einum massivum gudiligum trýsti. Nú er ikki ilt at ímynda sær, at vit nærkast ørskuni. Nógvir sjómenn kenna hetta, tá teir hava brotið vakt og hava staðið og kruvt í tímar og dagar – sum at vera fullur. Nú fer hesin kensluligi, sosialpsykologiski og religiøsi kokkteylurin at fylla ólukksáliga nógv, og so kanska saman við tí, at tey ikki ganga til nakað annað í frítíðini. Tá skilji eg væl, at foreldrini verða ørkymlað og eg hevði eisini kent meg í dýrastu neyð.

### Pastorur ella Jesus

Tá vit práta við foreldur í Klaksvík er greitt, at tað í stóran mun er pastorinum, tey ungu eru hugtikin av. Hann er fittur og blíður, dugir væl at tala og so er hann komin til Harran, hóast hann ikki hevur verið av Guds bestu børnum. Til hetta sigur Eyðun, at tað tykist sum, at talan er um eina einmanssamkomu, og at vandi tá er fyri, at fokus verður flutt frá Jesus og yvir á pastorin.

– Tá er einki vunnið, tí trúgvin ella frelsan verður ikki rótfest, sigur hann.

### Rennur av aftur

Foreldrini, sum vit hava prátað við, siga, at tey biðja til og vóna, at hetta upplopið gongur yvir av sær sjálvum. Og Eyðun sigur, at tað ger tað helst, tí tað gera upplop altíð.

– Eins og ørska rennur av aftur, fer hendan bylgjan eisini at leggja seg, tá ein tíð er fráliðin, og tað er eisini mín vón. Annars ber eisini til at venda sær til barnaverndina, tí hon eigur at verja børn og ung. Ella fyrst og fremst, kundu foreldrini tikið eitt prát við hesar menninar, og roynt at greitt teimum frá um óttan og serstøku etisku ábyrgdina, sum teir bera á herðum sínum, sigur Eyðun.

– Sum tað ljóðar, so yvirskýggjar málið alt annað – um tað so skal syndra familjulívið. Og tað haldi eg vera ótrúliga óetiskt, sigur Eyðun avgjørdur at enda.

*Pastorurin í Getsemane, André Matras hevur lisið hesa grein. Í hesum sambandi stóð honum eisini í boði at gera eina samrøðu við blaðið. Men hann ynskti ikki at taka av hesum tilboði.*

## Fyrsta PISA-kanningin verður í morgin

**Hósmorgunin verður fakligi førleikin hjá føroyskum skúlanæmingum kannaður**

FÓLKASKÚLIN

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað verða allir næmingar, sum eru føddir í 1990, sum skulu taka lut í OECD-verkætlanini PISA 2006. Sambært Mentamálaráðnum er talan um, at eini 850 næmingar í Føroyum vera við í kanningini.

– Endamálið við at lata næmingarnar í Føroyum luttaka í hesi altjóða kanning er at fáa eina meting um, hvussu kunnleikastøðið hjá næmingum í Føroyum er, samanborið við næmingar aðrastaðni í heiminum. Bert við at vita, hvussu støðið er, ber til at stinga út í kortið og gera av, hvussu farast skal fram fyri at menna undirvísingina, sigur Mentamálaráði á heimasíðuni hjá ráðnum

Kanningin fer soleiðis fram, at allir næmingar fáa eitt hefti í part við 26 uppgávum, og teir fáa 2 tímar til at loysa tær. Harumframt skulu næmingarnir svara einum hefti við spurningum um eitt nú áhugamál, lesivanar og nýtslu av KT.

Fyrst í desember 2007 verður úrslitið av kanningini frá mars 2006 kunngjørt fyri øllum luttakaralondunum. 56 lond kring heimin luttaka í kanningini, sum tilsamans fevnir um umleið 250.000 næmingar, sigur Mentamálaráðið.

Í hvørjari PISA- kanning verða trý førleikaøki kannað. Hesi eru lesing, støddfrøði og náttúrulærugreinir. Í PISA 2000 varð høvuðsdentur lagdur á at kanna lesiførleikan, í PISA 2003 varð talan serliga um at kanna kunnleikan innan støddfrøði, og í PISA 2006 verður høvuðsdentur lagdur á at kanna næmingarførleikan innan náttúrulærugreinir.

## Brell í nýggj høli

Ser- og delikatessuhandilin, Brell, letur hósdagin upp í Klokkarastovu í Havn

Brell hevur, síðani handilin læt upp í heyst, hildið til í Handilskjarnanum, men í tíðindaskrivi sigur Róaldur Jákupsson, sum eigur og rekur handilin, at hann metir nýggju hølini hóska betri til ein slíkan handil.

Talan er um ein delikatessuhandil av slagnum, sum kanska ikki er so vanligur her hjá okkum. Kaffi, te, sjokuláta, olivenoljur og mangt annað er at finna í úrvalinum, sum eisini telur dygdargóður grýtur og kannur.

**-mørk**

## Rókur eigur mest seldu fløguna

Nýggja fløgan hjá Róki Jakobsen fór beinleiðis inn á ovastu rók á sølulistanum hjá 3'aranum. Fitti og peni poppurin hevur rakt beint í hjarta á føroyingum, tí ikki bert fløgan hjá Róki, men 8 av teimum 10 ovastu fløgunum eru fittar.

Nøvn sum Pussycat Dolls, Black Eyed Peas, Kelly Clarkson, James Blunt og Poppkorn dominera listan, meðan tað einasta eitt sindur ruflutta og ráa á listanum eru Makrel og Eminem á 7. og 10. plássi.

**-nud**

1. Rókur – Rókur
2. Pussycat Dolls – PCD
3. Black Eyed Peas – Monkey Business
4. Poppkorn – Poppkorn
5. Madonna – Confessions On A Dancefloor
6. Kelly Clarkson – Breakaway
7. Makrel – Transcend
8. James Blunt – Back To Bedlam
9. Now That's What I call Music 14
10. Eminem – Curtain Call